Dagf. 6. september 2022
HMR j. nr. 22/15454-4

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-020/2021 eftir § 52 a í tingskipanini um tilboð til giktasjúklingar í Føroyum, frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni.

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvørji líknandi tilboð eru ætlað til giktasjúklingar í Føroyum, nú túrarnir til Kroatia eru partvíst strikaðir?
2. Hvussu ætlar sjúkrahúsverkið at skipa viðlíkahaldsvenjingina og viðgerðina hjá giktasjúklingum í Føroyum í framtíðini?
3. Er peningalig sparing orsøk til stóru umleggingarnar/broytingarnar á giktaøkinum í Føroyum farna árið?
4. Hvussu nógvir giktasjúklingar, sum søkja heilsubót í sjúkrahúsverkinum, eru virknir á arbeiðsmarknaðinum í dag?

Svar:

Til spurning 1
Sambært Sjúkrahúsverkinum er tað mannagongdin til visitering av sjúklingum til klimaviðgerð, sum er broytt, soleiðis at umsóknir um viðgerð uttanlands til viðgerðarstøð, ið Sjúkrahúsverkið ikki hevur avtalu við, verða viðgjørdar í visitatiónsnevndini í Sjúkrahúsverkinum. Her verður støða tikin til, um viðgerðin verður játtað. Klimaterapi er ikki avtikið sum viðgerðartilboð, men kann nýtast sum viðgerðarháttur, tá sjúklingurin ikki tolir medisinska viðgerð.

Til spurning 2
Í løtuni er ein serlækni í reumatologi á Landssjúkrahúsinum. Avtala verður gjørd við Ríkissjúkrahúsið, har fastir serlæknar koma at hava tilknýti til Landssjúkrahúsið.

Tvey størv eru normerað til serlæknar á giktaøkinum, og ætlandi verður tøka starvið lýst leyst í næstum.

Innan fysioterapi á Landssjúkrahúsinum verður heittvatnshylur eitt tilboð til bólkar av giktasjúklingum, ætlandi í nakrar vikur. Arbeitt verður í løtuni við at menna hetta tilboðið. Innan ergoterapi fáa sjúklingar endurvenjing ella viðgerð.

Á Klaksvíkar sjúkrahúsi verður intensivt endurvenjingartilboð veitt ambulantum giktasjúklingum 3 ferðir um vikuna í 10 vikur. Tað eru 3 endurvenjingarskeið um árið við tveimum bólkum hvørja ferð. Endurvenjingin verður skipað av fysioterapeuti, ergoterapeuti, heilsurøktara og psykomotoriskum terapeuti. Eisini har verður heittvatnshylur nýttur.

Innan fysioterapi á Suðuroyar sjúkrahúsi er heittvatnshylur eitt tilboð til bólkar av giktasjúklingum. Innan ergoterapi fáa sjúklingar endurvenjing ella viðgerð.

Til spurning 3
Peningalig sparing er ikki orsøk til broytingarnar.

Sambært Sjúkrahúsverkinum er orsøkin í høvuðsheitinum, at tað eru hend stór framstig í viðgerðini seinnu árini, har viðgerðin við lívfrøðiligum heilivági er nógv ment. Ein avleiðing av hesum er, at færri giktasjúklingar hava tørv á klimaviðgerð. Tað eru tó summi, ið av ymsum ávum ikki kunnu fáa lívfrøðiligan heilivág. Hjá teimum kann klimaviðgerð vera ein møguleiki. Sum áður nevnt er klimaviðgerð ikki avtikið sum viðgerðartilboð, men kann nýtast sum viðgerðarháttur, tá sjúklingurin ikki tolir medisinska viðgerð.

Til spurning 4
Heilsumálaráðið og Sjúkrahúsverkið hava ikki hagtøl fyri, hvussu nógvir giktasjúklingar, sum søkja heilsubót í sjúkrahúsverkinum, eru virknir á arbeiðsmarknaðinum í dag.

Heilsumálaráðið, 6. september 2022

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður